

# SØT ELLA SYNDAFULL TIL JÓLABORÐHALD

## Hetta vilja **kvinnur** hava...

**1)** *Ein mann, sum dugur at gera mat og hevur eitt gott starv!*
**2)** *Ein mann, sum fær teg at flenna!*
**3)** *Ein mann, sum tú kanst líta á!*
**4)** *Ein mann, sum elskar at elska við tær!*
**5)** *..men tað er umráðandi, at hesir fýra mennirnir ikki kennast!*



**Varrastift á skjúrtuflippuni?**
Gniggja uppvaskisápu á blettin, legg skjúrtuna í ein plastposa í 5 tímar og vaska sum vanligt...



## Kanna eftir, um tú ert klár til jólafrokostin?

**Set X**

Nylonsokkar
Tyggigummi
Intimserviettar
Lummafløska
Varrastift
Hýt
Push-up's
Sjálvbrúnari
Eftirgjørdar negl og vippur
Angribollar
Munnspray
Siggarettir og eld
Sodavatn og pizza á køl
Treo
Spann
Trussir
Fartelefon
Visakortið hjá manninum
Plástur til føturnar



## Tey flestu skikka sær pent

Visti tú, at tað er størri vandi fyri, at tú endar í slagsmáli, enn at tú mígur í buksurnar á jólafrokostinum?

Í øllum førum, um vit skulu trúgva tí stóru jólafrokostkanningini hjá Ekstra Blaðnum, har 2500 fólk vórðu spurd, hvussu tey hava skikkað sær á jólafrokosti.

Eisini er minni vandi, ella møguleiki, fyri, at tú bara nálgast uppi í einum starvsfelaga ella stjóranum, enn at tú hevur sex við onkrum. 15 prosent siga seg bara hava nálgast, og 16 prosent hava havt sex.

1 prosent av mannfólkunum og 5 prosent av kvinnunum hava havt sex við stjóranum!

Men tað vanliga er, at fólk skikka sær pent. Hetta siga 22 prosent seg gera. Kortini eru 19 prosent, um hava spýð á einum jólafrokosti.

## Jólafrokosturin hjá stjóranum:

.. tú ert eisini stjóri, tá tú ert til jólafrokost
.. tú ert ein fyrimynd fyri starvsfólkini
.. halt tey edrúa/n
.. ikki tosa um løn og setanarviðurskifti
.. mark er millum privat og persónligt
.. sig orsaka mánadagin, um tú kortini drekkur ov nógv og gjørt okkurt býtt
.. hetta er starvsfólkaball, so far heim, áðrenn fólk verða erlig

Kilde: Ledernes Hovedorganisation